# Ítróttarfelag Fuglafjarðar



# ÍF - B68

LANDSKAPPING
Leygardagin 17. mei 2003
Kl. 15.00 í Fuglafirði

HAVSBRÚN

VENJARIN!

# EITT TÝDNINGARMIKIÐ PAR

**Ein av tættunum, sum vit fara at hava í nøkrum av leikskráunum í ár, er "VENJARIN". Í táttinum fara vit at tosa við ein - ella fleiri - av okkara venjarum. Tosa verður um venjing, upplæring, áhugamál og ymiskt annað, sum er viðkomandi fyri tann einstaka venjaran.**

Ein sera týdningarmikil partur í arbeiðnum hjá ÍF er barna- og ungdómsarbeiðið. Uttan eitt gott barna- og ungdómsarbeiði er jú torført at seta góðar spælarar við í bestu deildunum hjá felagnum. Til hetta krevst, at venjarar eru til allar deildirnar hjá felagnum, og ikki er tað altíð so lætt at fáa allar venjararnar settar.

Tó er onkur, sum hevur vant børnini í fleiri ár, og má hetta sigast at vera serstakliga gott fyri felagið. Ein tann, sum hevur virkað longst sum venjari hjá børnunum, er venjarin hjá smádreingjum, Ragnhard Petersen.

Síðan hann byrjaði við dreingjunum í 1998 hevur hann fylgt teimum øll árini uttan eitt, har hann tó hjálpti til at venja teir.

Ragnhard hevur gingið høgt upp í venjarauppgávuna. Dreingirnir hava umframt at lært at spæla fótbólt eisini lært at vera saman við hvørjumøðrum og at bera seg væl at, bæði undir venjing og í dysti. Úrslitini hava eisini verið heilt góð, m.a vórðu piltarnir í fjør Føroyameistarar á hálvum vølli,- ein sigur øll í felagnum vóru errin av. Ragnhard hevur eisini verið við dreingjunum til kapping í Danmark. Úrslitið var kanska ikki tað besta, men fyri tað sosiala mundi henda ferðin vera av teimum heilt góðu. Aftur her vísti Ragnhard sína dygd sum venjari og leiðari hjá dreingjunum. Dreingirnir skiftust at spæla inni allar dystirnar, og lutakast varð gjørt fyri at finna teir, ið skuldu byrja uttanfyri til hvønn dystin. Júst hetta gjørdi ferðina til nakað heilt serligt, sum helst allir dreingirnir fara at minnast til.

Smádreingirnir venja triggjar ferðir um vikuna í hálvanannantíma. Uppmøtingin er góð, í miðal 14 dreingir eru til hvørja venjing. Teir spæla í økisbólkinum og hava klára seg væl, - vunnið 4 dystir, tapt ein og spælt ein javnan, og liggja væl fyri í kappingini um at sleppa at spæla í meistarabólk-inum.

Tá vit tosa um Ragnhard og smádreingirnar, ber illa til at fara uttan um Ólav Ellingsgaard, sum eisini hevur gjørt eitt megnararbeiði fyri ÍF, eisini sum hjálparvenjari hjá hesum



*Ragnhard (myndin) og Ólavur Ellingsgaard hava verið eitt ógvulig týdningarmikið venjarapar hjá ÍF síðstu árini.*

liði. Hann hevur nýtt nógv tíð og orku at hjálpt til bæði við sjálvari venjingin og til dystirnar, og hevu hann tí verið ein góðu stuðul hjá Ragnhardi.

At ÍF hevur nýtt gott a Ragnhardi og Ólavi er litið at ivast í og ikki man farc at vera long tíð, fyrr enn nakrir av smádreingjunun fara at vera ímillum teir, ið mynda bestu deildina hjá ÍF.

Nevndin hjá ÍF takka Ragnhardi og Ólavi fyr gott arbeiðið ígjøgnum fleiri ár.

*Spurningar til venjaran eru á bls 27*



## TÚ

**Navn:** Atli Petersen
**Føðingardagur:** 21.05.1985
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** Fiskavirkari í Gøtu
**Pláss á vøllinum:** høgri vongverji
**Hædd og vekt:** 180 cm og 75 kg
**Yvirtrúgv:**
**3 orð sum lýsa teg:** "sjarme, selvtillid og lækkert hår"
**Torførast mótstøðumaður:** Helgi hjá Irenu
**Frítíðarítriv:** Curling
**Vónir fyri 2003:** Menna meg sum spælara og at vit flyta upp



## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** næst síðsti dystur í fjør ímót HB í Havn
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** um 5-6 ára aldur
**Aðrar ítróttargreinar:** Flogbóltur
**Minnigarríkasti dystur:** Dysturin ímóti NSÍ í unglingadeildini. Vit vunnu 4-1 í semifinaluni í steypakappingini
**Størstu fótbólstliga ávirkan:** Rúni beiggi
**Besti fótbóltsleikari:** Zinedane Zidane
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** flogbólt
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** skot uppá mál
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** at renning
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Toldo - R. Carlos, Nesta, Cannavaro, Cafu - Giggs, Veron, Totti, Figo - Zidane, Raul

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** enskan búff og erina kalda kola
**Slag av tónleiki:** alt, uttan tað sum Hanus dámar
**Sjónvarpssending:** Spin City
**At slappa av:** at hyggja eftir filmi saman við Sverra
**Troyggja nr.:** Nr. 18
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Sigfríður Clementsen
**Sjónvarp/filmstjørna:** Robert de Niro
**Besta bók/blað:** Skipalistin 2001



O·N·L·Y

VERO MODA

>> vælkomin í KATO

Fuglafjørður





Álvaskot

Fysioterapiviðgerðarstova

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur



**Lastvognskoyring**



**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

**Kári Zachariassen**

**530 Fuglafjørður**

**tel. 444 245 ella 217 245**



**Føroya Shell**

| | |
|---|---|
| Streymoy | 34 74 00 |
| Norðoyar | 45 77 11 |
| Eysturoy | 44 87 11 |
| Vágar | 33 27 11 |
| Sandoy | 36 17 11 |
| Suðuroy N | 37 27 11 |
| Suðuroy S | 37 47 11 |








**HYDRAULIK**
**RÁÐGEVING**
**VERKÆTLANIR**
**ÍSETANIR**
**UMVÆLINGAR**
**MASKINUMVÆLINGAR**
SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING



**Á goymslu:**

Hydr, slangur og fittings, hydr, rør og fittings, (manøvri- og kúluventilar, kúlu-leigir, hydr. filtur, smyrji- og brenniolju-filtur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.

**Sølu-og tænastuumboð fyri:**

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispol)
- Rapp Hydema Syd (garna- og línuspol, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspol)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- Dension hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælimotorar)
- Dinamic Oil (kranaspol)
- Finn Filter (hydraulik-, brenniolju og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (ídnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

**KJ-HYDRAULIK**

P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com


Salong Yndi
530 Fuglafjørður
Tel. 444 490



FØROYA BANKI



P.O. Box 97
FO-110 Tórshavn
Tel +298 350 000
Fax +298 350 001
hotel@hotel.fo
www.hotel.fo

Bílegging av pizza


www.pizza.fo


FLÜGGER
- Dygdarmáling til lágan prís
- Lyklar, innramming, gólvtilfar og fiskireiðskap til smábátin

*Tasjan á Bugnum*
530 Fuglafjørður
tel. 44 50 44
fartel.: 22 11 09







# Leiga buss??



Vit hava ein buss til 16 persónar.
Harav serútgjørdur til 8 ferðandi í rullustóli.
Vit eru altíð til reiðar at samráða eina nøktandi loysn fyri báðar partar.

**Andreas Poulsen**
Sýðrugøta tel. 22 52 20 ella 44 17 20

*Heimavirkis søla og framsýning*

*Piddasa handil*

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

*Gallari Ribarhús*

*Opið er:*
*mán.-fr: 15.00-17.30*
*leyg.: 11.00-13.00*

*Tel. 444 427*

GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71

**Altíð nýbakað breyð**

**Sunnumorgnar fæst breyð á hesum støðum:**

Statoil í Leirvík
Hjá Halluri í Gøtu
Statoil í Skálabotni
Statoil í Saltangará
Kiosk Vár í Saltangará
Statoil á Strondum

**Handilin er opin soleiðis:**
Má-Ley: 07.00-17.30
Sun: 08.30-10.30

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður - tel./fax 444 385






SMS tel. 31 30 11 Saltangara tel. 44 80 48

**Tilfar til umvælingar, ábøtur ella annað....**
**....spyr fyrst hjá okkum!!**

**Fuglafjarðar Timburhandil**
**tel. 444 126**






**Fiskamjøl**



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, høsnarungar, svín og neyt.

**Fiskalýsi**



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

**Fiskafóður**



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

**Uppisjóvarfiskur**



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.

HAVSBRÚN

**HAVSBRÚN**
Havsbrún Ltd. · 530 Fuglafjørður
tel. 444 100 · fax 444 160
havsbrun@havsbrun.fo
www.havsbrun.fo



## Úrvalsbilar Spf.

- Søla av brúktum innfluttum bilum
- Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

· www.bilar.fo

Bakkavegur · 530 Fuglafjørður · tel. 444 943 · fax 444 638 · Fartel. 281943



CLIMACOOL RESPW
800,00



REKORD
700,00



A CUB.TWIN STRI
1.400,00



SUPERSTAR II
700,00

P/F THOMAS DAM

ÍTRÓTTUR á Glyvrum - Glyvravegur - Glyvrar - tel 44 73 99 - fax 44 73 97



# Fuglafjørður



býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak



býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala



**Stutt sagt:**



býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar kommuna**

tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo

**Fuglafjarðar Keypsamtøka**

Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895



Gardintoy
Gardinstengur
Persiennur
Rullugardinur
Liftgardinur
Tógv & stokkar
Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt
gardin ella tógv prát

Toy & Tógv • 530 Fuglafjørður • tel. 444 494



# Heildarveiting av tí heimskenda merkinum HP (Hewlett Packard)





HEWLETT® PACKARD
Expanding Possibilities

**Alt innan heimateldur, virkisteldur, servarar, prentarar, net og mangt annað....**

**Avtala um viðlíkahald av teldum/teldukervi kann gerast út frá tygara tørvi.**

**Arbeitt verður fyri virkir, skúlar og stovnar.**

Vit selja og veita undirvísing í bókhaldsskipanini Stellar Office og Stellar Office Pro

## Atlantic Online Sp/f

Í Støð 8
FO-530 Fuglafjørður
Tlf: +298 444487
e-post: atlantic@online.fo



## Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri eini tekning, vilja tit smíðja sjálvi ella skulu tey vera lyklaklár.

Eg bjóði meg til:

- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
v. Jørmund L. Juul (verkfrøðingur & húsasmiður)

☎ 21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jljuul@post.olivant.fo

FAROE SEAFOOD

Fiskavirkið í Fuglafirði · Postboks 53 · tel. 444 500 · faks 444 580





BAADER®

Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu.

Nú umboða vit eisini Fomaco saltsproytur.

P/F Petur Larsen






*Reiðari innan frakt- & sandbátar*
*Krana- og lastvognskoyring*
*Sandsøla*

**SANDGREVSTUR**

Stovnað 1949

530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921




B S

**P/F BOÐASTEINUR**
Bakkavegur 26
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
Tlf. +298 444800
Fax +298 444840
E-mail: alibo@post.olivant.fo









HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA

UNDIRVATNSLJÓS
UNDIRVATNSKAMERA
TRÁÐLEYST VIDEO SAMSKIFTI
ALARMSKIPANIR
PLC-STÝRINGAR

EL-MOTORAR
EL-LUTIR
FREKVENS UMFORMARAR
EL-TALVUR
FYLGISVEINASJÓNVARP TIL SKIP

JT electric

JT electric Ltd. Kambsdalur Faroe Islands Tel +298 474444 Fax +298 474445 jtelectric.com

*Blómuhandilin*

**Orkis**

*625 Glyvrar*

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

***Stórt úrval av gávulutum***

*tel 44 82 89*
*fax 44 89 89*

**Danny Transport**

**Tel. 31 91 92**

**Flutningur um allan heim!**

Landsins **størsta** og **besta** úrval av ítróttarheiðursgávum

- Steyp
- Heiðursmerki
- Heiðursbrøv
- Toy við búmerki
- Streamers
- Klistrimerki
- Seruppgávur við gravering

Vit seta **títt** búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað

FA. **EILIF ARGE**
KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK
TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76



**Tannlæknastovan**

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358










**Nissan Micra**

Tann nýggi Nissan Micra er ætlaður at skapa gleði millum fólk.

Tann nýggi Nissan Micra hevur til dømis minsta vendiradius í sínum flokki. Nýggi Micra hevur eisini mest framkomnu lásiskipan hugsast kann. Og tá ið tú setir bilin frá tær, lýsir hann tær heim. Vitjið hjá Nissan við Oyggjarvegin ella vitjið heimasíðuna www.nissan.fo



Nissan Micra

P/F **Meinhardt Arge**
við Oyggjarvegin
Tórshavn
tel. 345400 - fax 345401

# HAGTØL & FAKTA

## Vert at vita

Dysturin er dag er fyrsti landskappingardystur okkara í ár. So endiliga er hol sett á landskappingina, sum vit vóna verður spennandi, og at okkara menn fara at liggja í toppinum.

Komandi leygardag 24. mei skulu teir leika ímóti B36 í Gundadali, og tá mugu tit fara fjølment til Havnar at stuðla teimum. Næsti heimadysturin er ímóti B71. Dysturin verður leygardagin 31. mei.

3. deild spælir í morgin ímóti EB/Streymi á Mølini. Næsta sunnudag, 25. mei, spæla teir ímóti Skála á Skála.

Um tú atkvøður í dag um, hvør er dagsins leikari, so er tú við í lutakastinum um at vinna eitt lambskrov frá Haraldsen. Atkvøðuseðlar eru á síðu 26, ella tú kanst fáa teir í ovaru hæddini Ítróttarhúsinum undir og beint eftir dystin.

| Aðrir dystir í dag 2. deild |
|---|
| B71 - B36 |
| VB - Sumba |
| KÍ - LÍF |
| TB - AB |

| Dystir í 1. deild 16.05 - 1. umfar |
|---|
| NSÍ - Skála |
| HB - FS Vágar |
| GÍ - KÍ |
| VB - B36 |
| EB/Streymur - B68 |

| Dystir í 3. deild 18.05 - 1. umfar |
|---|
| NSÍ - Skála |
| HB - FS Vágar |
| GÍ - TB |
| Royn - B36 |
| EB/Streymur - ÍF |

| Dystir í steypakappingini 2. hálvfinal. 18.05 |
|---|
| GÍ - NSÍ (1-1) |
| KÍ - B36 (1-4) |

### PILTARNIR

# VUNNU GULL Í 2002



Piltarnir hjá okkum, sum leiktu á hálvum velli, vunnu í fjør sannførandi FM-heitið. Av teimum fimm dystunum, sum teir leiktu í finaluni, vunnu teir 4 og leiktu ein javnleik. Málúrtøkan hjá teimum var 36-2. Vit ynskja teimum tillukku og góða eydnu í framtíðini.

Standandi f.v.: Ragnhard Petersen, venjari, Ási Dam, Jan Ó. Ellingsgaard, Svein Magnason, Pauli Ø. Mohr, Jógvan Ingvard Olsen, Heri H. Nesá og Ólavur Ellingsgaard, venjai. Húkandi f.v.: Uni R. Petersen, John Andre Niclassen, Arnar Dam og Dánjal á Lakjuni








# TIPS 13



## VEDDA OG VINN VIÐ BIRGARI OG JANUSI

Í ár hava vit broytt spurnarkappingina frá ti gomlu "15 spurningunum" til eina tips13-kapping. Í hesi nýggju kapping er møguleiki at vinna okkurt. Hesaferð er vinningurin ein sodavatnskassi frá Føroya Bjór. Fyri at luttaka og vinna, skalt tú seta kross í tann rútin (1, X ella 2), ið tú heldur/veitst eru rættir. Skrivað navn, bústað og tlf. nr. og lat hann inn í ovaru hædd í ítrottarhúsinum undir ella beint eftir dystin. Tann ella tey, sum hava svara flest spurningum rætt, eru við í lutakasinum um EIN vinning. Góða eydnu!

*Røttu svarini til spurningarnar hasaferð fært tú at vita í næstu leikskrá.*

Navn:

Bústaður:

Telefon:

*TIPS 13 seðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 min. eftir loknan dyst.*

Klipp ella skræð

| ÍF TIPS 13 (set x í rætta rútin) | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. Toppskjúttin í føroysku 1. deild 2002 gjørdist? **1.** John Petersen **X.** Andrew av Fløtum **2.** Ulrik Balling | | | |
| 2. Hvat var liðið, ið endaði næstniðast í 1. deild 2002? **1.** EB/Streymur **X.** TB **2.** Skála | | | |
| 3. Nær var ÍF stovnað? **1.** 1946 **X.** 1948 **2.** 1979 | | | |
| 4. Hvør er liðleiðari hjá ÍF 2. deild? **1.** Eilif Eliasen **X.** Símun Fornagarð **2.** Trúgvi Nesá | | | |
| 5. Hvør hevur leikt flest dystir í Premier League (10 ár)? **1.** Gary Speed **X.** Alan Shearer **2.** Ryan Giggs | | | |
| 6. Hvør leikari hevur fingið skjótasta reyða korti í Premier League? **1.** Vinnie Jones **X.** Sami Hypia **2.** Jason Dodd | | | |
| 7. Hvussu eitur heimavøllurin hjá Chelsea? **1.** White Hart Lane **X.** Elland Road **2.** Stamford Bridge | | | |
| 8. Hvør er yngsti málskjútti í Premier League? **1.** Wayne Rooney **X.** Michael Owen **2.** James Milner | | | |
| 9. Hvat av hesum liðum hevði best málúrtøku í Premier League 2002/03? **1.** Leeds **X.** Tottenham **2.** Everton | | | |
| 10. Brotsspark! Skjúttin spælir bóltin 1,5 metur paralelt við mállinjuna. Ein viðleikari rennur inn og sparkar bóltin á stongina, og bólturin kemur síðani út til brotssparks-skjúttan, sum síðani skorar! Hvat ger dómarin? **1.** Dømur umspark **X.** Dømur mál **2.** Óbeinleiðis fríspark | | | |
| 11. Hvussu breið kann mállinjan max. verða? **1.** 8 cm. **X.** 10 cm. **2.** 12 cm. | | | |
| 12. Hvussu breitt og høgt skal málið verða? **1.** 2,44 m h., 7,32 b. **X.** 2,48 m h., 7,36 m. b. **2.** 2,46 m. h., 7,34 m. b. | | | |
| 13. Hvussu nógv mál gjørdi Pelé í sínum 1363 dystum? **1.** 1178 **X.** 1281 **2.** 1311 | | | |

# ÁRSINS ÍF´ARI 2002

## TAÐ SKAL EISINI VERA STUTTLIGT AT VERA LEIKARI OG ÁSKOÐARI....

Aftur í ár fara vit at skipa fyri eini kapping, har tit kunnu velja 3 teir bestu leikararnar hjá 2. deild monnum.

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig.

Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst.

Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast.

Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddina í Ítróttarhúsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.

### VINNINGAR

- Ársins ÍF´ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár.

Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen.

HARALDSEN
- títt keyp -

### Atkvøðuseðil

ÍF - B68, 17. mei 2003

Dystur: ____________

Nr. 1 (5 stig): ____________
Leikari

Nr. 2 (3 stig): ____________
Leikari

Nr. 3 (2 stig): ____________
Leikari

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari: ____________ Tel.: ____________





# 9 SPURNINGAR til venjaran!

**Navn:**
Ragnhard Petersen

**Føddur:**
27.06.82

**Hvussu leingi hevur tú verið venjari?**
Síðan 1998, tá eg byrjaði at venja smápiltarnar, sum í dag eru smádreingir. Havi vant teir øll árini, uttan eitt ár, tá Jóan Símun vandi teir. Hetta árið plagdi eg tó at hjálpa Jóan Símuni við venjingini.

**Hvussu ber tað til, at tú bleiv venjari í 1998?**
Høgni Z. og eg høvdu tosað saman um at sleppa at venja eitt lið, so vit spurdu Harley, sum tá sat í nevndini, um vit kundu sleppa at venja smápiltarnar, og tað sluppu vit.

**Hevur tú nakra útbúgving sum venjari?**
Ja eg havi tikið venjaraskeiðini A,C og D.

**Hvat leggur tú størsta dentin á sum venjari?**
Eg leggi størsta dentin á teknisku venjingini. Annars leggi eg eisini stóran dent á, at dreingirnir uppføra seg væl og sostatt vera eitt gott umboð fyri ÍF.

**Hvat mál hevur tú sett tær sum venjari í ár?**
At vinna bólkin, vit spæla í, og sostatt koma í meistarabólkin, men hetta verður kanska torført, tí vit fáa harða kapping frá EB/Streymi, GÍ og Skála.

**Hvørjar framtíðarætlanir hevur tú sum venjari?**
Eg veit ikki rættiliga.

**Hvørja venjing dámdi tær best, tá tú spældi fótbólt?**
At spæla dyst.

**Hvørja venjing dámar dreingjunum serliga væl?**
Eisni at spæla dyst, og tað sleppa teir eisini til hvørja venjing. Vit nýta uml. 15 – 20 min. hvørja ferð til dyst.

**Hvussu dámar tær at vera venjari?**
Væl. Tað er stuttligt bæði at læra dreingirnar at spæla fótbólt og at vera saman við teimum á vøllinum. Teir hava verið rættiliga seriøsir, men tað sum hevur givið mær mest sum venjari, er tað sosiala. Harafturat má eg siga, at foreldrini hava stuðlað mær og dreingunum sera væl. Tey hava hjálpt til øll árini, bæði við at koyra og sum áskoðarar. Foreldrini hava gjørt sítt til, at mær hevur dámað so væl at verið venjari.

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**Postboks 94**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444 636**
**Fax 444 636**

***Aðalnevndin:***
Formaður
Rúni Petersen, tel. 215887
2. formaður
Høgni á Lakjuni tel. 444418
Peningarøkil:
Linda Joensen, tel. 445132
Skrivari:
Hildigarð Eliasen, tel. 444052/228771

***Fótbóltsdeild:***
Hildigarð Eliasen tel. 444052
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Ólavur Larsen, tel. 224659
Mortan Nónsgjógv
Atli Petersen, 444 018

***Venjarar:***
***2. deild:***
Sigfríður Clementsen, tel. 31 76 59
***3. deild:***
Báður Mortensen, tel.
***4. deild:***
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
***Old Boys:***
Sonni Jensen, tel. 444 975
***Unglingar:***
Birgar Larsen, tel. 21 37 10
***Dreingir Ø.:***
Janus Petersen, tel. 26 43 99
***Smádreingir Ø.:***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Smádreingir 1/2 vøllur***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Piltar 1/2 v a-b.:***
Hanus Eliasen, tel. 22 17 52
***Smápiltar:***
Atli Petersen, tel. 26 82 95
***Gentur:***
Durita Djurhuus, tel. 44 50 24
***Smágentur:***

***G.10-12 ár:***
Jónfríð Joensen, tel. 254170
***Yngst:***
Hanna Poulsen

# ÍF

# B68

1. Fróði Poulsen
2. Áki Petersen
3. Jan Skoradal
4. Viggo Johannesen
5. Heini Heinason
6. Fritleif í Lambanum
7. Martin Hansen
8. Sverri Ellingsgaard
9. Rúni Petersen
10. Hanus Eliasen
11. Eyðolvur R. Petersen
12. Rógvi Ròin
13. Høgni á Lakjuni
14. Ken Bærentsen
15. Eyðun Ryggshamar
16. Jákup Helgi Egholm
17. Høgni Zachariassen
18. Atli Petersen
19. Roy Róin
20. John S. Thomsen

Venjari: Sigfríður Clementsen
Hj.venjari: Rógvi Róin
Liðleiðarar: Trúgvi Nesá
Tórstein Joensen

___ Mortan Hansen
___ Hans Erik Danielsen
___ Ovi Magnussen
___ Jan Joensen
___ Johan Dávur Højgaard
___ Eskild Højgaard
___ Alex
___ Óli Olsen
___ Jónleif Gerðisá
___ Aksel Højgaard
___ Rógvi Fossdalsá
___ Ronny Svalbard
___ Heri Jacobsen
___ Áki Joensen

Venjari: Aksel Højgaard
Hj.venjari:

## Dómarabólkur:

Dómari: Jóannes Mikkelsen, GÍ
Hjálpardómarar úr GÍ

## Bóltsponsorur:

Sámal A. Hansen